## Óført fiskarí

Týskir stuttleikafiskimenn hava havt gott fiskarí við tráðu á Arnarfirði í Íslandi í seinastuni. Eitt ferðalag, sum júst hevur vitjað í bygdini Bildudali, fekk ikki minni enn 9.200 pund. Nógv tað mesta var toskur, og nakrir rættiliga stórir vóru uppií. Eitt nú vigaði tann størsti 44 pund, skrivar blaðið Vísir. Blaðið leggur afturat, at veðrið hevur verið týsku stuttleikafiskimonnunum til vildar. Fiskimenninir kunnu leiga bát og tráður í Bildudali.



## Leggja SHEFA-2 kaðalin

Arbeiðið at leggja nýggja sjókaðalin, sum millum annað skal tryggja fleiri trygg altjóða sambond við útheimin, er byrjað. Kaðalskipið IT Intrepid hjá International Telecom kom til Maywick í Hetlandi tann 25. juli, har byrjað var at leggja kaðalin mótvegis Føroyum. Í Føroyum verður kaðalin lagdur inn á Hvítanes, har sambandið verður ført víðari til Klingruna í Hoyvík. Væntandi tekur tað ein mánað at leggja kaðalin upp til Føroyar. Kaðalin verður lagdur í trimum pørtum, ið knýta Føroyar – Hetland, Hetland – Orkney og Orkney – Skotland saman. Í dag er høvuðssambandið við útheimin FARICE-kaðalin, sum varð tikin í nýtslu í 2004.



# Filmsýningar í Miðlahúsinum

**Forvitnisligur filmur um torvskurð í Húsavík verður sýndur í Miðlahúsinum á ólavsøku, umframt ein film úr Føroyum, sum Miquell Hidalgo gjørdi í sjeytiárunum**

TORVFILMUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Síðani Sosialurin flutti í Miðlahúsið fyri trimum árum síðani, hevur húsið verið opið á ólavsøku, og eldri og forvitnisligir filmar hava verið á skránni.

Soleiðis verður eisini í ár.

### Burtur á heiði

Á ólavsøku ber til at leita sær inn í Miðlahúsið at síggja filmin um torvskurð í Húsavík, sum danski læknin Knud Goll og Jákup Andreas Arge gjørdu fyri eini 40 fjøruti, 50 árum síðani.

Filmurin vísir gamla samfelagið við torvskurði, arbeiðið, ið hevði við hetta at gera, og hvussu fólk og umstøður vóru tá. Hetta hevur verið í tøkum tíma, tí torvskurður hevur hesa tíðina verið um at fara í søguna. Fyri stuttum kom eisini bókaverk eftir P.J. Sigvardsen, ið lýsir alstóra týdningin, sum torvið hevði í føroyska samfelagnum, innan føroyingar fóru at nýta oljufýr, fyri at fáa hita.

Knud Goll og Jákup Andreas Arge tóku upp, Heðin Brú skrivaði saman við Valdemar Dalsgarð og fornfrøðingurin Sverri Dahl leggur rødd til. Magnus D. Jacobsen, Magnus á Kamarinum, gjørdi tónleikin. Filmurin er hálvan tíma langur og eitur Burtur á Heiði.

### Brúktu ljósmotor

Jákup Andreas Arge sigur, at orsøkin til at teir fóru undir filmin var, at hann vaks upp í Húsavík, tí tey fluttu suður í 1940. Tey brúktu torv í Húsavík. Seinni hitti hann Knud Goll, tá grundarsteinurin til Landssjúkrahúsið varð lagdur.

Teir vóru báðir áhugaðir í filmframleiðslu. Teir gjørdu ein film í felag, ið nevndist Føroyar í Dag, og samdust síðani um at gera filmin um torvarbeiði.

- Uttan Goll hevði ongin filmur verið. Og sjálvandi eiga øll tey mongu úr Dali og Húsavík størtsa heiðurin, sigur Jákup Andreas Arge.

- Eg haldi tað var fyrst í sekstiárunum, at vit gjørdu filmin. Øll tey, sum eru við, hava verið við í torvarbeiði. Eg minnist, at vit brúktu ein ljósmotor, tá vit gjørdu filmin, tí onki ljós var í Húsavík tá. Tað kom um hesa tíðina, men eitt sindur seinni, sigur Jákup Andreas Arge, ið minnst, at í Húsavík livdu fólk av tí, ið var innangarðs.

Hann leggur afturat, at í hansara tíð í Húsavík brúktu fólk torv, men summi fingu kol úr Hvalba, men hetta var bert nýtt, tá okkurt heilt serligt skuldi bakast, kanska til jóla.

### Føroyafilmur

Filmar eru tiknir upp í Føroyum millum ár og dag og eru frálíkar lýsingar av samfelagnum og tí menning, ið er farin fram. Enn ein eldri filmur úr Føroyum er á skránni í Miðlahúsinum á ólavsøku.

Hetta er ein føroyafilmur. sum Miquell Hidalgo gjørdi í sjeytiárunum, verður sýndur í Miðlahúsinum á ólavsøku. Filmurin er áhugaverdur og m.a. eru nógvar ólavsøkumyndir í filminum. Filmurin er 19 minuttir langur.

# Eingin ólavsøka uttan KFUM-basar

**Aftur í ár ber til at spæla 21-spæl, fiska í fiskibrunninum og royna eydnuhjólið í hølunum hjá KFUM, ið hevur skipað fyri basari í skjótt 60 ár**

*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

At spáka frá miðbýnum niðan í KFUM er ein óloysiligur partur av ólavsøkuni hjá mongum.

Og tað eru nógv í vilja vera við, at um tú ikki leggur leiðina framvið basarin í KFUM, ja, so hevur tú ikki verið á ólavsøku.

Hugsar ein samstundis um hvussu leingi basarurin hevur verið, so er ikki løgið, at hesin er vorðin ein inngrógvin partur av tjóðhátíðini.

### Eitt gamalt tiltak

Sjálvt um bygningurin hjá KFUM ikki var vígdur fyrr enn í 1952, so varð hann tikin í brúk í 1949. Longu tá varð skipað fyri tiltøkum, ið skuldu hjálpa við figgingini av bygninginum. At byrja við var talan um eitt lítið innsavningartiltak, ið ikki lá á ólavsøku. Men sum tíðin er liðin hevur basarurin rótfest seg væl og virðiliga í ólavsøkuna og samstundis voksið seg nógv størri.

Okkurt hendingaárið hevur eingin basarur verið, men sum heild hava limir og onnur sjálvboðin verið trúføst at skipa fyri tiltakinum í skjótt 60 ár.

### Alt er sjálvboðið

Tað er allarhelst fleiri havnarmenn við mær, ið ikki hava stórvegis aðrar fiskiroyndir enn tær, ein hevur fingið sær við fiskibrunnin í KFUM. Og har verður dúgliga fiskað á hvørjum árið.

Hesir pakkarnir skulu sjálvandi eisini pakkast inn. Og tað taka eldri stuðlarnir sær av. Um veturin møtast hesi eitt ávíst kvøld um vikuna og pakka fleiri enn túsund pakkar. Og hetta verður alt gjørt uttan nakra samsýning.

Hølini, sum millum annað verða nýtt av einum frítíðarskúla um dagin, skulu ruddast og ymiskt skal flytast út.

Básarnir skulu setast upp, og somuleiðis skulu allir vinningarnir, sum eru nógvir í tali, berast av loftinum oman í hølini, har alt gongur fyri seg.

Alt hetta verður gjørt av sjálvbodnari arbeiðsmegi, og yvirskotið fer til virksemið hjá KFUM.



*Nógvar fyrireikingar og nógv arbeiði liggja aftan fyri basarin, ið vorðin ein partur av ólavsøkuni hjá mongum. Ívar Dam Guttesen, ið er ein av fyrireikarunum, fær teir síðstu smálutirnir upp á pláss, áðrenn hurðarnar opna leygardagin.*
*Mynd: pwh*